

*Bæði veðrið og lagið var av tí fagrasta, tá føroyskir útisetar hildu ólavsøku á Norðuratlantsbryggjuni*



*Føroyski búnin varð sjálvandi eisini funnin fram til høvið*

Ólavsøkan á Norðuratlantsbryggjuni:

# Harmoniku-dansur og breyð við føroyskum viðskera

SÍMUN ÚR KONOY
*Myndir: Mortan Jakobsen*

Árliga ólavsøkuhaldið á Norðuratlantsbryggjuni eydnaðist væl. Hugnaligt var at sita úti í góðveðrinum og eta breyð við føroyskum viðskera við eini kaldari fatøl afturvið.

Danir hava ikki eins og føroyingar frí á Ólavsøku. Tí var lítið fólk seinnapartin, men tá ið klokkan var farin av seks, tustu føroyingar og útlendingar oman á keiøkið, og sum fráliður var bryggjan fullsett.

Her beyðst møguleikin at hitta vinir og kenningar, tú ikki hevur sæð í áravís, og einki er so mergjandi fyri bæði likam og sál sum ein swing-om til gott harmonikuspæl.

Men, ikki øll vóru nøgd. Summi mettu, at skipað varð fyri ov fáum tiltøkum. Hvar var Sámal Ravnsfjall, Martin Joensen, countrykongurin Hallur, Jens Lisberg og Hanus G. Johansen? Tað finnast eisini fleiri føroyskir útisetar, sum kundu havt víst teirra kynstur, sum t.d. Guðrun Sólja Jacobsen.

Uttandurapallurin stóð tómur í alt ov langa tíð, mettu tey.

Onkur annar metti, at tvey WC er ov lítið til øll hasi fólkini. Har burdi havt verið einar tvær sokallaðar pissikummur, harmannfólkini kundu havt kastað sær av vatninum uttandura.

Men tá ið tað er sagt, eiga vit ikki at gloyma, at størsta týdningin hevur sosiala samveran – og tað var nóg mikið av henni henda góðveðursdagin í Norðuratlantsbryggjuni.





Í Sambandi við at Fonn Flog letur ferðaskrivstovu upp á Áarvegnum 6 í Havn, hava vit møttóku 3. aug. kl. 16:00 – 18:00.

*Vælkomin!*

FONN FLOG

Fonn Flog í Klaksvík – Saltangara – Tórshavn tlf 476363 www.fonnflog.fo

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Fróðskaparsetur Føroya

bjóðar í heyst skeið í enskum

Í heyst bjóðar Fróðskaparsetur Føroya út skeið í enskum. Skeiðini verða bjóðað út í samstarvi við University of Cambridge ESOL Examinations

Skeið: Cambridge in Advanced English og Cambridge Certificate of Proficiency in English

Lærari: Sharon Christiansen

Tilmeldingarskjal: www.setur.fo

Tilmeldingarfreist: 25. september 2009

Próvtøkur: Mánaðarskiftið mai/juni 2010

Skeiðsgjald: kr. 3.000,- umframt próvtøkugjald

Próvtøkugjøld: First Certificate in English kr. 1.300,-
Certificate in Advanced English kr. 1.400,-
Certificate of Proficiency in English kr. 1.500,-

Cambridge in Advanced English

Tíðarskeið: Frá 22. oktober til mai/juni 2010, (v 31)

Undirvísing: hósdagar kl. 13.00 – 16.00

Fortreytir: 10. floks støði ella samsvarandi kunnleiki, ávísur førleiki í at nýta málið, talað og skrivað

Cambridge Certificate of Proficiency in English

Tíðarskeið: Frá 21. oktober til mai/juni 2010., (v 31)

Undirvísing: mikudagar kl. 09.00 – 12.00

Fortreytir: Staðið "Advanced English", málsligt students, HF , HH prógv ella samsvarandi, góðan førleika at nýta málið

Næmingatalið er avmarkað. Gjaldast skal í seinasta lagi við skeiðsbyrjan

Skeiðs og próvtøkugjald: konto 9870 428.097.1, í Suðuroyar Sparikassa, viðm. navn og skeið

Skeiðsstaður: Fróðskaparsetur Føroya, Jónas Broncks gøtu 25, 4. hædd, 100 Tórshavn

Upplýsing um skeiðini: Setursskrivstovan, tlf. 352500 ella setur@setur.fo

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum



FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo